Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Borðreitt av nýggjum

## *Oddagrein*

FULLVELDISÆTLANIN hjá landsstýrinum gongur ikki sum ætlað, og tað tykist sum ein avís desperatión er at hóma í Tjóðveldisflokkinum. Teir draga eitt uppskot fyri og annað eftir úr hattinum, so hvørt sum undanfarnu vera kolldømd.

SUM Heini O Heinesen segði í samband við málið um Landsverksfrøðingin, so hevur Tjóðveldisflokkurin svølgt nógvar kamelar í hesari samgonguni. Síðani hava vit so sæð málið um Vágatunnilin, har Tjóðveldisflokkurin aftur bakkaði. Andstøðan hevur víst á eitt ávíst høgrarák í føroyskum politikki, og Óli Breckmann úr Fólkaflokkinum hevur havt á orði, at tað er vorðið nakað trongligt á høgraveinginum í føroyskum politikki, nú tjóðveldið tekur undir við politikki teirra. Einasti, ið ikki viðgongur hettar er formaður Tjóðveldisfloksins Høgni Hoydal.

ALT omanfyristandandi hevur Tjóðveldisflokkurin staðið modell til, tí málið er fullveldi, kosta hvat tað kosta vil. Teir gloyma, at ivasamt er, um Fólkaflokkurin hevur tikið nakað stig á Sjálvstýrisleið, síðani kongsjørðin bleiv yvirtikin fyri á leið 40 árum síðani.

EFTIR Løgmansrøðuna tykist tað sum um, at kamelarnir hjá fólkaflokkinum vóru uppi. Nú er so borðreitt av nýggjum fyri Tjóðveldisflokkin. Caragata álitið skal eftir øllum at døma førast út í lívið. Almennar ognir skulu gerast upp í krónur og oyru. Hesar ognir skulu so eftir øllum at døma seljast og ein búskapargrunnur skal setast á stovn. Hettar merkir, at ognirnar hjá Føroyagrunninum, Framtaksgrunninum og Fígging-argrunninum og kanska okkurt afturat skulu seljast, og ein nýggjur grunnur skal stovnast fyri peningin, ið kemur úr sølu av ognum hjá hinum trimum grunnunum.

ÁHUGAVERT hevði verið at fingið at vita, hvussu stórur hesin grunnur skuldi verið fyri at geva eina milliard um árið í forrentning. Eisini hevði verið áhugavert at vitað hví teir verandi grunnarnir ikki bert kunnu brúkast til endamál samgongunar.

TAÐ mest álvarsama í øllum hesum fullveldismálinum er, at samgongan ger alt, hvat hon kann, fyri at sleppa undan at tosa um føroyska inntøkugrundarlagið. Tað er púra burturvið, at samgongan fyrst roynir at fáa donsku stjórnina at gjalda í 15 ár fyri føroyskt fullveldi, og nú kemur so eitt uppskot sum, um tað yvirhøvur hevði borið til, ger, at føroya land skal partvíst liva av rentum, tí inttøkugrundarlagið eftir øllum at døma er ov tunt.

TAÐ hevði verið uppá sítt pláss, um allar góðar kreftir í føroyum – herundir allir politiskir flokkar, tíverri tykist tað sum um at Tjóðveldisflokkurin hevur lyndi til at vera í so bráður – royndu at arbeiða fram ímóti einum sjálvberandi føroyskum búskapi. Tá hettar málið er nátt, uttan fullveldi fyri danskar pengar ella rentum úr einum fiktivum grunni, so kunnu Høgni Hoydal og aðrir fara at tosa um fullveldi, heldur enn at blíva við at lokka fólk til at basera seg uppá fuglarnar á takinum, heldur enn tann man hevur í hondini. Tað er gamalt at gjalda fyri seg – spurningurin, sum føroyingar eiga at spyrja seg sjálvan, er um man kemur sær at krevja evsta vald fyri annans gjald.

*Sosialurin*

*Stjórin í Atlants Kolvetni:*

# – Vit eru nøgdir

*-sum einasta veruliga føroyska oljufelag at hava fingið loyvi*



JAN MÜLLER

Nú oljusamtakið The Faroes Partnership, sum føroyska oljufelagið Atlants Kolvetni er partur av, hevur fingið eitt av teimum góðu loyvunum í sokallaða „Gullhorninum" í landssynningspartinum av føroyska landgrunninum hava vit spurt Vilhelm Petersen, stjóra í felagnum, hvussu teir eru nøgdir.

Hann sigur, at felagið í útgangsstøðinum varð stovnað við tí endamáli at vera við í fyrsta leitiumfarinum í Føroyum. Og tá teir skuldu velja eitt samtak at arbeiða saman við varð mett um, hvat var rætt at samstarva við út frá vitan og royndum og harvið møguleika til at fáa leitiloyvi. Har fall valið á The Faroes Partnership.

- Vit hava verið nøgdir við gongdina higartil og eisini við tað loyvi, sum samtakið nú hevur fingið tillutað. Talan er um eitt loyvi, sum goymir rættiliga áhugaverdar møguleikar sigur stjórin í Atlants Kolvetni.

Vilhelm Petersen heldur sjálvur, at tað er sera áhugavert sum tað einasta føroyska felagið at vera við í tí fyrstu útbjóðingini. -Gott nokk er tað nevnt, at talan er um tvey føroysk oljufeløg, men til tað vil eg bert siga, at tað eru so nógv feløg, sum eru skrásett í Føroyum men sum ikki hava veruligar røtur her. Atlants Kolvetni er føroyskt burturav. Tað er stovnað av føroysku vinnuni og føroyingum. Tað er ikki umboðsfelag fyri útlendsk áhugamál. Vilhelm Petersen vísir á, at tað er í minni mun av føroyskum kapitali í tí felagnum, sum nevnir seg Føroya Kolvetni.

Íkastið hjá Atlants Kolvetni til samtakið hevur annars verið tað føroyska innihaldið í umsóknini, sum Vilhelm Petersen metir skilagott. -Er tað nakar, sum hevur innlit í føroyska samfelagið og vinnuna her, so má tað vera Atlants Kolvetni, ið hevur allar sínar røtur í tí føroyska samfelagnum. Stovnararnir hava mett, og tað er eisini okkara ynski, umframt at vera við til at geva samtakinum eitt veruligt føroyskt innihald, at kunna byggja upp eitt óheft føroyskt oljufelag, uttan at skula vera umboð fyri útlendsk áhugamál.

# DONG væl nøgt

*Umhugsar at stovna føroyskt dótturfelag, sum kann samvinna við føroyingar á fleiri orkuøkjum, eitt nú innan vindmyllur og aðrar alternativar orkukeldur*

JAN MÜLLER

Millum feløgini í The Faroes Partnership samtakinum, ið hevur fingið loyvi at leita eftir olju, er eisini danska felagið DONG. Søren Gath Hansen, stjóri í Dong sigur, at teir eru sera væl nøgdir við loyvið, tí tað fevnir um eitt øki, har teir síggja sera áhugaverd prospekt. -Tað arbeiði, ið vit kunnu her har, kann uttan iva vera við til at avklára, um har finst olja og gass sigur hann og vísir á, at teir hava sjálvandi søkt fleiri staðni, men tað teir fingu eru teir sera fegnir um.

Hóast Dong-stjórin er bjartskygdur, so heldur hann tað kortini vera rætt at gera sær greitt, at tað kunnu koma fyri fleiri brunnar, sum eru turrir, áðrenn vit kenna økið gott nokk. -Vit kunnu sjálvandi vera hepnir, men eg haldi tað er týdningarmikið at sláa kalt vatn í blóðið, gjøgnumføra nakrar boringar til vit so kenna økið nóg væl. Hann heldur tí, at tað gott kunnu ganga fleiri ár til olja verður funnin og vísir í hesum viðfangi á, at man má gera sær greitt, at hetta er nakað langsiktað.

Dong er eitt av feløgunum, sum hevur verið við frá byrjan og hevur stjórin har sera rósandi orð at bera føroyskum oljumyndugleikum. -Her er jú talan um eitt sera lítið samfelag, men dygdin í arbeiðinum hjá Oljumálastýrinum er á einum sera høgum støði. Man hevur gjøgnumført eina altjóða útbjóðing uppá sera stutta tíð og tað er ótrúliga væl klárað.

Luturin hjá Dong í samtakinum var 10% men varð herfyri øktur tiol 17%. Hetta hava teir gjørt, tí teir trúgva uppá føroyaøkið. Søren Gath Hansen sigur, at Dong er komið til Føroya fyri at verða verandi. Tað vónar hann. Ætlanin er helst at stovna eitt føroyskt dótturfelag hjá tí danska Dong einaferð í framtíðini.

-Tað snýr seg heldur ikki bara um olju og gass. Vit eru eisini sinnaðir til at samstarva við føroyingar á øðrum orkuøkjum, eitt nú innan vindmyllur og aðrar viðvarandi orkukeldur.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara kæri bróðir

**TOBIAS ANDREAS ASKILDSEN**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur og kransar og gávu til Zarepta. Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Fyri tey avvarðandi*

**Theodine, Sunneva og Olav**



# Slætt borð í Nes Kommunu



*Kommunekreditt, Tryggingin og Føroya Banki fáa í næstum ein trivaligan kekk frá Nes Kommunu, sum harvið rindar alla sína skuld á 15 milliónir krónur*

DIA MIDJORD

– Í komandi viku skulu vit viðgera spurningin einaferð aftrat og síðani taka endaligu avgerðina, sigur Ólavur Magnussen, bygdaráðsformaður í Nes Kommunu.

Hann leggur aftrat, at mest sannlíkt verður skuldin rindað aftur, men endaliga avgerðin verður ikki tikin fyrr enn seinast í hesum mánaðinum.

– Vit hava sagt upp øll okkara lán og ætla at rinda teimum alt í hondina, sigur bygdaráðsformaðurin.

**Eiga á bók**

Teir 1100 íbúgvarnir í Nes Kommuna, sum umfatar bygdirnar Nes, Toftir og Saltnes, vilja ikki longur hava nakað haft um beinini.

Tá harðast leikaði á í kreppuárunum, hevði kommunan eina skuld upp á 22 milliónir krónur. Skuldin er í dag komin niður á 15 milliónir krónur og skal eftir ætlan burtur um ein góðan mánað.

Men er tað ikki ein stórur klattur at gjalda hjá kommununi?

– Jú, tað er tað kanska. Men vit eiga allan pengin, sigur Ólavur Magnussen.

Bygdaráðsformaðurin heldur, at vælstandurin um alla Føroyar er ein orsøkin til, at kommunan í dag er so væl fyri fíggjarliga. Og so hava tey arbeiði til allar hendur í Nes Kommunu.

– Munurin á tíðini í dag og í kreppuárunum er so stórur, at tað skal næstan upplivast, sigur hann.

**Íløguloft**

Ólavur Magnussen vísir á, at íløgukvotan, sum landsstýrið hevur ásett, forðar kommununum at gera ov stórar íløgur í einum. Í ár kann Nes Kommuna fremja íløgur fyri 4,1 millión krónur.

– Tað eru ikki nógvir pengar, men tað røkkur til eitt sindur, sigur bygdaráðsformaðurin og sipar til, at alt er relativt.

– Hetta er nógv hjá onkrum, ið ikki eigur so nógv til íløgur, men kanska í minna lagi, tá ið ein hevur væl meira í kassanum, sigur bygdaráðsformaðurin í Nes Kommunu.

# 120 ára løgtingstíðindi á netinum

*Í gjár varð nýggj tænasta at finna á heimasíðuni hjá Føroya Løgtingi. Har ber nú til at lesa løgtingstíðindi heilt afturi frá 1880 fram til í dag. Og tað er ikki lítið umfatandi tilfar, tí løgtingsmálini eru eini 20.000 í tali frá 1880 fram til í dag*



RÚNAR REISTRUP

Internetsíðan hjá Føroya Løgtingi er eftir hondini blivin eitt umfatandi skjalasavn, og í gjár varð ein nýggjur varði lagaður á síðuni.

Løgtingstíðindi ígjøgnum hundrað og tjúgu ár eru nú tilgeingilig á internetsíðuni.

Løgtingstíðindi eru ársfrágreiðingar um virki á tingi, ið eru givnar út síðan 1880. Hetta skjalatilfar fyllir nógvar hillametrar, tí tilsamans er talan um einar 65.000 síður av løgtingstíðindum.

Ein deild á norska tjóðbókasavninum hevur staðið fyri at scanna tær nógvu síðurnar inn á teldu, og føroyska fyritøkan VIT hevur greitt tilfarið til internetsíður.

Samanlagt hevur tað kostað løgtinginum einar 250.000 krónur at gera Løgtingstíðindi um til internetsíður, so øll nú hava møguleika at síggja hendan partin av føroyasøgu uttan at leita tað fram millum tey fáu prentaðu eintøkini, ið finnast. Arbeitt verður í løtuni við at fáa allar lógir og kunngerðir á netið, so ikki kann sigast annað, enn at tá tað ræður um at nýta internetið til at kunna um virksemi sítt, er politiska valdið í Føroyum frammarlaga.

Løgtingstíðindi finnast á heimasíðuni hjá Føroya Løgtingi: www.logting.fo


